Landsbanki Føroya
GOVERNMENTAL BANK

# FÍGGJARPOLITISK REGLUVERK

8. FEBRUAR 2010

## STUTT LÝSING

# INNIHALDSYVIRLIT

INNGANGUR OG SAMANDRÁTTUR ..... 3
ATLIT TIL BÚSKAPIN O.A. ..... 5
REGLUVERK Í ØÐRUM LONDUM ..... 7
FYLGISKJAL A: STÝRING AV KOMMUNUM Í YMSUM LONDUM ..... 11
BÓKMENTIR ..... 12

# INNGANGUR OG SAMANDRÁTTUR

Endamálið við ritinum er stutt at lýsa, hvussu fíggjarpolitisk regluverk kunnu vera ein týðandi partur av at tryggja ein skilagóðan og haldføran fíggjarpolitikk. Eisini verður lýst, hvørji atlit eru at taka, tá ið tílík regluverk verða sett í gildi.

Komandi árini verður neyðugt hjá politisku skipanini at betra um javnvágina millum almennar inntøkur og útreiðslur. T.e. neyðugt verður hjá almenna geiranum at fara undir eitt tíðarskeið við konsolidering. Kanningar av tílíkum konsolideringsátøkum í øðrum londum benda á, at greið regluverk kring fíggjarpolitikkin kunnu gera tað lættari at fremja tílík konsolideringsátøk í verki og halda fast við teir batar, ið verða gjørdir á javnvágina millum almennar inntøkur og útreiðslur.[1]

Regluverkið kring fíggjarpolitikkin í Føroyum hevur tó álvarsligar manglar á týðandi økjum. Álvarsligastu manglarnir eru, at

- Útreiðslu- og íløgukarmur verður ikki lagdur fyri almenna geiran ella land og kommunur nøkur ár fram í tíðina.

- Einki krav er um at javnvág skal vera í rakstrinum hjá landskassanum ella fyri land og kommunur yvir eitt ávíst áramál ella sæð yvir eitt miðallangt tíðarskeið.

- Einki krav er um, at óvæntaðar ella ikki-varandi inntøkur hjá landi ella kommunum heilt ella lutvíst skulu í búskapargrunn ella nýtast at niðurrinda skuld við.

- Einki krav er um, at tað almenna ella politiska skipanin setir sær greið og skillig mál fyri, hvussu stór brutto- og/ella nettoskuldin hjá tí almenna í mesta lagi má vera, sæð yvir eitt miðallangt tíðarskeið.

Øll framkomin lond hava sett í gildi regluverk kring almenna fíggjarpolitikkin.[2] Ein fortreyt fyri jøvnum búskaparvøkstri er, at tað almenna hevur tamarhald á skuldarbyrðuni. Endamálið við at hava regluverk kring fíggjarpolitikkin er at fremja javnan búskaparvøkstur umvegis tamarhald á skuldarbyrðuni hjá tí almenna.

Regluverkið kring fíggjarpolitikkin í Føroyum má sigast at vera ófullfíggjað og ótíðarhóskandi. Løgtingslóg nr. 42 frá 4. mai 2009 um landsins játtanarskipan er tó ein bati á summum økjum sammett við áður. Tó eru enn álvarsamir manglar í regluverkinum kring fíggjarpolitikkin, sum víst á omanfyri.

Fleiri atlit eru at taka, tá ið lond seta í gildi tílík regluverk. Fíggjarpolitisk regluverk eiga at verða tillagað til búskapin og eiga at vera somikið smidlig, at tey taka atlit til búskaparstøðuna, t.d. tá ið óvæntaðir stoytir raka búskapin. Í øðrum lagi er neyðugt, at ávísar bindingar eru í regluverkinum í tann mun eitt tílíkt regluverk skal ávirka førda fíggjarpolitikkin.

Tvey høvuðssløg av bindingum eru í tílíkum regluverkum. Regluverkini kunnu hava ítøkilig mál fyri fíggjarlógina ella tey kunnu áseta reglur fyri, hvussu útreiðsluvøksturin skal vera yvir eitt ávíst áramál. Í heila tikið ber til at siga, at lond hava frægastu royndir av regluverkum, sum hava reglur fyri útreiðsluvøkstur í almenna geiranum yvir eitt ávíst áramál umframt at hava ávísar smidligar ásetingar um fíggjarlógina.

---

[1] Sí OECD (2007) og Landsbanki Føroya (2010).

[2] Sí talvu 1 og OECD (2007).

Til tess at fáa tílík regluverk at virka á besta hátt eiga tey at vera einføld og lætt skillig. Harafturat er umráðandi, at kommunali geirin eisini er fevndur av regluverkinum, umframt at ásetingar um, at óvæntaðar og ikki-varandi inntøkur skulu í búskapargrunn ella nýtast at niðurrinda skuld við í fleiri førum kunnu vera skilagóðar.

# ATLIT TIL BÚSKAPIN O.A.

Endamálið við at seta í gildi regluverk kring fíggjarpolitikkin er at fremja javnan búskaparvøkstur umvegis tamarhald á skuldarbyrðuni hjá tí almenna. Tað kann vera óheppið fyri ein búskap, um javnvág ikki er millum almennar inntøkur og útreiðslur yvir eitt longri áramál. Renstustøðið kann hækka orsakað av vaksandi skuldarbyrðu hjá tí almenna, og íløgurnar í búskapinum, framleiðsluevnini og inntøkustøðið í framtíðini kunnu tískil lækka.

Fíggjarpolitisk regluverk hava tvey høvuðsatlit at taka:

- Atlitið til fíggjarpolitiskt haldføri og trúvirði sæð yvir eitt longri tíðarskeið.
- Atlitið til fíggjarpolitiska rásarúmið og møguleikarnir hjá fíggjarpolitikkinum at standa ímóti stoytum og at tálma konjunktursveiggjum (t.e. standa ímóti stutttíðarsveiggjum í búskapinum).

Tvey høvuðsløg av bindingum eru í fíggjarpolitiskum regluverkum:

- Ásetingar um fíggjarætlanina fyri almenna geiran.[3]
- Ásetingar um útreiðslustøðið hjá almenna geiranum.

Einki fíggjarpolitiskt regluverk er, sum hóskar seg til øll lond. Regluverk mugu tillagast til hvønn einstakan búskap, alt eftir hvussu viðbrekin búskapurin er mótvegis ymsum stoytum og alt eftir hvørjar fortreytir eru at seta í gildi fíggjarpolitisk regluverk (t.d. søguligar, mentanarligar og stovnsligar fortreytir).

Føroyski búskapurin er lítil og opin, umframt at hann er nógv tengdur at náttúrutilfeingi. Tí er búskapurin lutfalsliga viðbrekin mótvegis stoytum. Eitt møguligt regluverk kring fíggjarpolitikkin í Føroyum eigur tí at vera lutfalsliga smidligt, soleiðis at fíggjarpolitikkurin fær staðið ímóti stoytum á búskapin.

Niðanfyri eru aðrir eginleikar, ið mælt verður til at fíggjarpolitisk regluverk hava til tess at fáa so góðan virknað sum gjørligt.

## Regluverk eiga at vera greið, einføld og lætt skillig

Sum heild er semja millum búskaparfrøðingar um, at fíggjarpolitisk regluverk eiga at vera greið, einføld og løtt at umsita og skilja. Á henda hátt er gjørligt at hava eftirlit við, hvørt førdi fíggjarpolitikkurin er í samsvari við regluverkið og meginreglurnar í hesum um skilagóðan fíggjarpolitikk. Harafturat eru størri sannlíkindi fyri, at politiska skipanin stendur til svars fyri førda fíggjarpolitikkin og ábyrgjast í tann mun førdi fíggjarpolitikkurin ikki er í samsvari við regluverkið.[4]

## Karmar eiga at vera fyri kommunur

Í tann mun tílík regluverk skulu ávirka førda fíggjarpolitikkin hjá samlaða almenna geiranum er neyðugt, at kommunur eisini eru fevndar av regluverkinum. Karmar o.a. fyri útreiðslur yvir eitt ávíst áramál mugu tí eisini fevna um kommunala búskapin. Hetta er serliga neyðugt, tá havt verður í huga, at kommunur mest sannlíkt fáa fleiri uppgávur at loysa komandi árini og tískil størri ávirkan

[3] Eitt dømi um hetta er kravið í Stabilitets- og vakstrarsáttmálanum hjá ES, sum krevur at tað almenna hevur hall á í mesta lagi 3% av BTÚ.

[4] Eitt dømi um hetta er Fiscal Responsibility Act, 1994, í Nýsælandi, sum ásetur nakrar meginreglur fyri ábyrgdarfullan fíggjarpolitkk. Fiscal Responsibility Act, 1994, er seinni vorðin partur av einum størri regluverkið kring fíggjarpolitikkin í Nýsælandi, Public Finance Act, 1989. Sí eisini Janssen (2001).

á samlaða búskapin. Í fylgiskjali A er eitt yvirlit yvir, hvussu onnur lond stýra kommunala geiranum.

## Avleiðingar um regluverkið ikki verður hildið

Í fleiri londum, ið hava góðar royndir av tílíkum regluverkum, eru ávísar mannagongdir innbygdar, sum gera tað kostnaðarmikið politiskt at føra fíggjarpolitikk, ið er í stríð við meginreglurnar í regluverkinum. Hetta kann t.d. vera krøv um óhefta kunning til almenningin um framtíðarætlanir og avleiðingar av teimum, kunning av fíggjarætlanarframskrivingum nøkur ár frameftir o.t.

Krøv kunnu eisini vera um, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum leggur fram nýggjar og endurskoðaðar ætlanir í teimum førum fíggjarpolitikkurin ikki er í samsvari við meginreglurnar í regluverkinum, ella at hann kunnar almenningin um hví fíggjarpolitikkurin ikki er í samsvari við meginreglurnar í regluverkinum. Tílíkar reglur eru t.d. í Nýsælandi, har royndirnar eru góðar av regluverkinum kring fíggjarpolitikkin.

## Búskapargrunnur ella ásetingar um óvæntaðar inntøkur

Lond ið eru viðbrekin mótvegis broytingum í býtislutfallinum í uttanlandshandlinum[5] (t.d. oljuútflytandi lond sum Noreg og Meksiko) hava góðar royndir av búskapargrunnum til óvæntaðar og óvanligar inntøkur. Tílíkir grunnar virka tálmandi á tey sveiggj, ið raka búskapir, ið eru viðbreknir mótvegis stoytum uttanífrá.

Eitt annað endamál við tílíkum grunnum er at tryggja, at framtíðarættarlið eisini fáa gagn av náttúrutilfeinginum. Búskapargrunnar og ásetingar um, at óvæntaðar og óvanligar inntøkur skulu setast til síðis heilt ella lutvíst, kunnu eisini stuðla uppundir, at tað almenna leggur til síðis í góðum tíðum og soleiðis førir fíggjarpolitikk, ið tálmar konjunktursveiggjum í búskapinum. Í Belgia eru t.d. ásetingar um, at óvæntaðar inntøkur ella útreiðslur ið eru minni enn væntað[6] skulu nýtast at niðurrinda skuld við, meðan fíggjarmálaráðharrin í Fraklandi hevur skyldu at kunnu almenningin neyvt um, hvussu óvæntaðar og ikki-varandi inntøkur verða nýttar í almennu fíggjarætlanini.

---

[5] Býtislutfallið í uttanríkishandlinum (“terms of trade” á enskum) er lutfallið millum út- og innflutningsprísir í miðal.

[6] T.d. tá ið roknskaparligar inntøkur vísa seg at vera størri enn inntøkumetingar vóru frammanundan.

# REGLUVERK Í ØÐRUM LONDUM

Í talvu 1 er stutt yvirlit yvir fíggjarpolitisk regluverk, ið eru sett í gildi í ymsum londum. Talvan vísir, at flestu lond í OECD hava ávísar ásetingar um ella mál fyri fíggarætlanina í almenna geiranum. Harafturat hava fleiri lond ásetingar um útreiðslustøðið hjá tí almenna.

Main fiscal rules currently applied in OECD countries — Talva 1

| Country | Date and name | Characteristics of the set of rules: Budget target | Expenditure target | Rule to deal with windfall revenues | Golden rule |
|---|---|---|---|---|---|
| Australia | Charter of Budget Honesty (1998) | yes | no | no | no |
| Austria | Stability and Growth Pact (1997)<br>Domestic<br>Stability Pact (2000) | yes | no | no | no |
| Belgium | Stability and Growth Pact (1997)<br>National budget rule (2000) | yes | no | yes | no |
| Canada | Debt repayment plan (1998) | yes | no | yes | no |
| Czech republic | Stability and Growth Pact (2004)<br>Law on budgetary rules (2004) | yes | yes | no | no |
| Denmark | Medium term fiscal strategy (1998) | yes | yes | no | no |
| Finland | Stability and Growth Pact (1997)<br>Spending limits (1991, revised in 1995 and 1999) | yes | yes | no | no |
| France | Stability and Growth Pact (1997)<br>Central government expenditure ceiling (1998) | yes | yes | Since 2006 | no |
| Germany | Stability and Growth Pact (1997)<br>Domestic Stability Pact (2002) | yes | yes | no | yes |
| Greece | Stability and Growth Pact (1997) | yes | no | no | no |
| Hungary | Stability and Growth Pact (2004) | yes | no | no | no |
| Ireland | Stability and Growth Pact (1997) | yes | no | no | no |
| Italy | Stability and Growth Pact (1997)<br>Nominal ceiling on expenditure growth (2002) | yes | yes | no | no |
| Japan | Cabinet decision on the Medium term fiscal perspective (2002) | yes | yes | no | no |
| Luxembourg | Stability and Growth Pact (1997)<br>Coalition agreement on expenditure ceiling (1999, 2004) | yes | no | no | no |
| Mexico | Budget and fiscal responsibility law (2006) | yes | no | yes | no |
| Netherlands | Stability and Growth Pact (1997)<br>Coalition agreement on multiyear expenditure targets (1994, revised in 2003) | yes | yes | yes | no |
| New Zealand | Fiscal responsibility act (1994) | yes | yes | no | no |
| Norway | Fiscal Stability guidelines (2001) | yes | no | yes | no |
| Poland | Stability and Growth Pact (2004)<br>Act on Public Finance (1999) | yes | no | no | no |
| Portugal | Stability and Growth Pact (1997) | yes | no | no | no |
| Slovak Republic | Stability and Growth Pact (2004) | yes | no | no | no |
| Spain | Stability and Growth Pact (1997)<br>Fiscal Stability Law (2001, revised in 2006) | yes | no | no | no |
| Sweden | Fiscal budget act (1996, revised in 1999) | yes | yes | no | no |
| Switzerland | Debt containment rule (2001, but in force since 2003) | yes | yes | yes | no |
| United Kingdom | Code for fiscal stability (1998) | yes | no | no | yes |

*Source:* OECD calculations.

## Ymsar royndir av regluverkum

Sum heild hava tey regluverk roynst frægast, sum hava ásetingar um útreiðslustøðið hjá tí almenna nøkur ár frameftir umframt ávísar smidligar reglur fyri fíggjarætlanina hjá tí almenna.

Fleiri orsøkir eru til, at hesar ásetingar tykjast vera tær skilabestu og tær, ið hava givið frægastu úrslit.[7]

T.d. eydnaðist í USA at venda stórum halli hjá tí almenna til avlop tíðarskeiðið 1990-2002 við einum regluverki,[8] sum ásetti greiðar reglur fyri útreiðsluvøkstur og útreiðslujáttanir hjá tí almenna.

Royndirnar við Stabilitets- og vakstrarsáttmálanum í ES eru hinvegin nakað ivasamar, hóast ikki ber til at gera sær nakrar endaligar niðurstøður um fíggjarpolitiska regluverkið hjá ES enn. Ein møgulig atfinning móti Stabilitets- og vakstrarsáttmálanum hjá ES er 3% markið fyri mest loyvda hall í almenna geiranum (tó við ávísum undantøkum og ávísum innbygdum smidleika), sum helst er ein nakað stirvin, torskild og tilvildarlig áseting.

Nýsæland var fyrsta lóggávuvald í heiminum at seta í gildi lóg um ábyrgdarfullan fíggjarpolitikk (1994), og nýsælendingar siga seg hava góðar royndir av teirra regluverkið kring fíggjarpolitikkin.[9] Regluverkið hjá teimum, Public Finance Act, 1989, verður mett at vera millum tey mest framkomnu á sínum øki. Regluverkið er støðugt ment og útbygt síðan farið varð undir hetta arbeiði í 1980'unum. Regluverkið hevur fleiri dámligar eginleikar. Í stuttum kann sigast, at tað setir upp ymsar meginreglur um ábyrgdarfullan fíggjarpolitikk, krevur at landsstýrið setir sær stutt- og langtíðarmál fyri almenna raksturin, umframt at neyv krøv eru í regluverkinum um kunning til almenningin um avleiðingar o.a. av førda fíggjarpolitikkinum.[10]

Mynd 1 vísir gongdina í samlaðum nettoskyldum og í avlopinum hjá almenna geiranum í Nýsælandi tíðarskeiðið 1986-2011. Myndin bendir á, at tað hevur verið góð stýring seinastu árini í almenna geiranum í Nýsælandi.

Samlaðar nettoskyldur og avlop (net lending) hjá tí almenna í Nýsælandi — Mynd 1




Viðm.: Tað almenna í myndini fevnir um samlaða almenna geiran, t.e. land kommunur og grunnar. 2009-2011 eru framrokningar.
**Kelda:** OECD.

---

[7] Sí Andersson og Minarik (2006) og OECD (2007) har nærri er greitt frá hesum.

[8] Budget Enforcement Act (1990-2002). Sí eisini OECD (2007).

[9] Sí Janssen (2001).

[10] Áhugað kunnu kunna seg um fíggjarpolitiska regluverkið í Nýsælandi á hesi slóðini: http://www.legislation.govt.nz/act/public/1989/0044/latest/DLM160809.html?search=ts_act_public+finance_resel&p=1&sr=1.

## Eitt sindur um føroyska regluverkið

Løgtingslóg nr. 42 frá 4. mai 2009 um landsins játtanarskipan er ein yvirskipað lóg við meginreglum um, hvussu inntøkur og útreiðslur verða játtaðar og við ávísum krøvum til fíggjarlógina og fíggjarlógartilgongdina sum heild. M.a. eru hesar greinar í lógini:

- § 1. Eingin útreiðsla má verða goldin og ikki má verða tikið ímóti inntøku, er játtan ikki útvegað frammanundan.
- § 3. Fíggjarlógin skal fevna um allar inntøkur og útreiðslur landsins og vera grundað á veruleikakendar vónir og so hollar ætlanir sum til ber um inntøkur og útreiðslur í fíggjarárinum.
- § 6. Játtanir verða veittar á høvuðskontum sum bruttojáttanir við serstakari játtan til at halda útreiðslur og hava inntøkur.
  Stk. 2. Farið kann ikki verða út um útreiðslujáttan við at vísa til meirinntøku í mun til inntøkujáttan.
- § 8. Fyri 1. apríl leggur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum fram uppskot til løgtingssamtykt, sum fevnir um ein samlaðan játtanarkarm fyri fíggjarlógina næsta ár, býtt á greinar.
  Stk. 2. Ein frágreiðing (Búskaparfrágreiðing I), sum lýsir og metir um búskaparstøðu Føroya, herímillum tann almenna geiran, verður løgd við uppskotinum til løgtingssamtykt.
  Stk. 3. Hvør landsstýrismaður ger innan fyri tillutaða játtanarkarmin sín part av fíggjarlógaruppskotinum.
- § 13. Ikki ber til at flyta játtan millum høvuðskontur ella flyta játtanir til seinni fíggjarár.
  Stk. 2. Innanhýsis flytingar millum høvuðskontur kunnu tó verða loyvdar við átekningum.
- § 16. Hóast ásetingina í § 6 verður rakstrarjáttan sett upp sum nettoútreiðslujáttan. Er inntøkan hægri enn ætlað, kunnu verða hildnar fleiri útreiðslur, bert ikki verður farið út um nettoútreiðslujáttanina. Er inntøkan minni enn ætlað, hevur hetta við sær, at útreiðslurnar skulu skerjast samsvarandi.
- § 22. Løgujáttan verður nýtt í sambandi við bygging, ognan ella avhending av bygningum, løgum og skipum o.ø. og í sambandi við stór viðlíkahaldsarbeiði.
  Stk. 2. Hóast ásetingina í § 13, kann tað við átekning verða givin heimild at flyta óbrúktar løgujáttanir til seinni fíggjarár.

Lóggávuni vantar ásetingar, áðrenn hon kann kallast eitt regluverk kring fíggjarpolitikkin hjá tí almenna við tí endamáli at fremja skilagóðan og haldføran fíggjarpolitikk. Eingin áseting er í lóggávuni, sum tryggjar, at landskassin ikki tekur stóra skuld á seg eftir stuttari tíð, eins og eingin áseting er, sum tryggjar, at politiska skipanin ikki missir tamarhaldið á útreiðsluvøkstrinum hjá tí almenna. Harafturat er eingin áseting, sum tryggjar, at stutt- ella langtíðarætlanir verða lagdar fyri samlaða almenna raksturin.

Ávísar bindingar eru álagdar kommunum í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri (kommunustýrislógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 71 frá 6. mai 2003. M.a. eru hesar greinar í lógini:

- § 43. Til lántøku, veðsetan, nýtslu av rakstraravlopi og tílíkum krevst samtykt frá kommunustýrinum.
  Stk. 2. Er nettoskuldin meira enn ein álíkning eftir einum av landsstýrismanninum árliga ásettum skattaprosenti, krevst loyvi frá landsstýrismanninum til lántøku og til broytingar í lánitreytunum.
- § 49. Ikki er loyvt kommunum at fíggja rakstur, rentur og avdráttir við lántøku ella við inntøku frá sølu av fastari ogn.
  Stk. 2. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um, nær tað í serføri kann gerast undantak frá ásetingunum í stk. 1.
- § 54. Er nettoskuldin hjá kommununi meira enn eina nettoálíkning, sbr. § 43, stk. 2, kann landsstýrismaðurin geva kommunustýrinum boð um at gera neyðugar broytingar í uppskotið til fíggjarætlan, í fíggjarætlan ella í eykajáttan, um landsstýrismaðurin metir, at:

inntøku-, útreiðslu- og íløgumetingarnar eru skeivar,
inntøku-, útreiðslu- og íløgumetingarnar eru gjørdar á skeivum grundarlagi, ella at inntøkurnar ella útreiðslurnar og íløgurnar eru órímiligar ella óneyðugar.

Sostatt eru ávísar lógarásetingar, sum í ávísum mun avmarka, hvussu stóra skuldarbyrðu kommunur kunnu taka á seg. Harafturat er ein sokallaður “golden rule” galdandi fyri føroysku kommunurnar; t.e. kommunur kunnu ikki fíggja rakstur, rentur og avdráttir við lántøku, uttan so at landsstýrismaðurin ger nærri reglur fyri, nær tað í serføri kann gerast undantak frá meginregluni.

Ein álvarsligur mangul í regluverkinum sum heild er, at útreiðslukarmar verða ikki lagdir ella avtalaðir fyri land og kommunur undir einum. Ábyrgdin fyri búskaparpolitikkinum liggur hjá løgtingi og landsstýri, meðan kommunur einans hava til uppgávu at menna og útbyggja lokala økið og veita borgarum sínum tænastur. Fortreytin fyri at virka fyri jøvnum búskaparvøkstri er tískil, at politiskar ætlanir taka hædd fyri búskaparstøðuni, og at politisk tiltøk verða sett í verk til røttu tíðina. Løgtingið og landsstýrið eigur tískil at virka fyri samskipan, soleiðis at kommunurnar og landskassin virka innanfyri avtalaðan útreiðslukarm.

# FYLGISKJAL A: Stýring av kommunum í ymsum londum

| Land | Yvirskipaður stýriháttur | Útinnan av regluverki |
|---|---|---|
| Danmark | Samráðingar millum land og kommunur. Samráðingar og samstarv millum landsmyndugleikar og Kommunernes Landsforening. Fíggjarætlanir hjá kommunum skulu javnviga. Kommunur hava heimildir at skriva út skattir.<br>Langtíðarlán eru loyvd upp til eitt mark. Bara loyvt at fíggja íløgur við lántøku. | Trýst frá landsmyndugleikum og fíggjarlig revsitiltøk. Avtalan millum landsmyndugleikarnir og Kommunernes Landsforening er ikki løgliga bindandi. Um "skattestoppet" ikki verður hildið, verður blokkstuðulin frá landinum minkaður samsvarandi netto. |
| Ísland | Samráðingar millum land og kommunur.<br>Ongar avmarkingar á lántøku. | Fyrisitingarlig revsitiltøk. Ein kommuna í gjaldstrupulleikum kann verða sett undir umsiting av landsmyndugleikunum. |
| Noreg | Fíggjarpolitiskt regluverk fyri kommunur. Landslutir og kommunur hava ikki heimild at hava hall av rakstrinum. Hall kunnu verða flutt frameftir upp til tvey ár.<br>Ongar avmarkingar á lántøku annað enn at kommunur ikki hava heimild at hava hall av rakstrinum. | Fyrisitingarlig revsitiltøk. Lántøka og langtíðarleigumál eru ikki loyvd hjá kommunum ið hava hall av rakstrinum og ikki fylgja ásetingunum um fíggjarpolitikk. |
| Svøríki | Fíggjarpolitiskt regluverk fyri kommunur. Álagt kommunum at hava javnvág á fíggjarlóg sæð yvir eitt tveyáratíðarskeið.<br>Ongar avmarkingar á lántøku, annað enn kravið um javnvág á fíggjarlógini. | Eingi revsitiltøk frá landsmyndugleikum. |
| Finnland | Fíggjarpolitiskt regluverk fyri kommunur. Álagt kommunum at hava javnvág á fíggjarlógini yvir eitt ávíst áramál.<br>Ongar beinleiðis avmarkingar á lántøku, og landið veðheldur ikki fyri skuld hjá kommunum. | Eingi revsitiltøk frá landsmyndugleikum. |
| Stóra Bretland | Avmarkað kommunalt fíggjarpolitiskt sjálvstýri.<br>Lán skulu góðkennast av landsmyndugleikum. | |
| USA | Eingin formlig samskipan. Flestu statir hava álagt at hava javnvág á fíggjarlóg.<br>Ongar avmarkingar á lántøku, annað enn krøvini um javnvág á fíggjarlóg. | Marknaðurin hevur eftirlit við fíggjarpolitikkinum. |
| Týskland | Samráðingar millum land og kommunur. Ein stabilitetssáttmáli er í gildi í Týsklandi álíkur stabilitets- og vakstrarsáttmálanum í ES.<br>Flestu landslutir hava ikki heimild at fíggja rakstur við lántøku ("golden rule"). Kommunur hava ikki heimild at fíggja rakstur við lántøku og lántøka hjá kommunum skal góðkennast av landsmyndugleikum. | Trýst frá landsmyndugleikum. Eitt fíggjarpolitiskt ráð hevur eftirlit við fíggjarpolitikkinum hjá landi og kommunum og kemur við tilmælum um fíggjarpolitikk, um regluverki ikki verður hildið. |
| Háland | Samráðingar millum land og kommunur. Kommunum er álagt at hava javnvág á fíggjarlóg yvir eitt ávíst áramál.<br>Ongar avmarkingar á lántøku, annað enn krøvini um javnvág á fíggjarlógini. | Fyrisitingarlig revsitiltøk. Landsmyndugleikar kunnu stuðla kommunum sum hava fíggjarligar trupulleikar um tær lata nakað av teirra fíggjarpolitiska sjálvræði til landsmyndugleikarnar. |
| Frakland | Fíggjarpolitiskt regluverk fyri kommunur. Kommunur hava ikki heimild at hava hall av rakstrinum.<br>Kommunur hava bara heimild at fíggja íløgur við lántøku ("golden rule"). | Fyrisitingarlig revsitiltøk. Kommunur sum hava hall av rakstrinum og ikki fylgja regluverkinum fáa álagt at taka neyðugu stigini at fáa javnvág í aftur. |

Kelda: OECD (2003).

# BÓKMENTIR

Anderson, Barry og Joseph J. Minarik. Design Choices for Fiscal Policy Rules. OECD Journal of Budgeting, Vol. 5, No. 4. Grein tøk á www.oecd.org, 2006.

Janssen, John. New Zealand's Fiscal Policy Framework: Experience and Evolution. Treasury Working Paper 01/25. New Zealand Treasury. Grein tøk á http://www.treasury.govt.nz/publications/, 2001.

Landsbanki Føroya. Konsolideringsátøk – royndir úr øðrum londum. Stutt rit tøkt á www.landsbankin.fo, 2010.

OECD. Fiscal Consolidation: Lessons From Past Experience. OECD Economic Outlook No. 81, Volume 2007/1, juni 2007.

OECD. Fiscal Relations Across Levels of Government. OECD Economic Outlook No. 74, Volume 2003/2, desember 2003.

Landsbanki Føroya

GOVERNMENTAL BANK

Landsbanki Føroya | Yviri við Strond 15 | P.O.Box 229 | FO-110 Tórshavn | Faroe Islands | Tel. +298 350300 | Fax +298 350301
www.landsbankin.fo | landsbankin@landsbankin.fo | VTal: 382809